Kanningin av sernámsfrø›isliga økinum:

Skulu meta um tilbo›ini

Bólkurin, sum kannar sernámsfrø›isliga øki›, skal taka stø›u til, um Sernámsdepilin skal halda fram í verandi líki ella um broytingar skulu gerast

KANNING
Ey›un Klakstein

Ein arbei›sbólkur skal nú endavenda Sernámsdepilin og øllum tí sernámsfrø›isliga økinum.
Mynd: Jens Kristian Vang

Nú ver›ur kanningin av Sernámsdeplinum og øllum tí sernámsfrø›isliga økinum sett í verk.

Bólkurin, sum skal gera kanningina, er manna›ur, og arbei›ssetningurin hjá bólkinum er or›a›ur og gó›kendur av landsst‡rismanninum í undirvísingar- og mentamálum.

Arbei›sbólkurin skal gera tilmæli um, um møguliga broytingar skulu gera í núverandi skipan, og um Sernámsdepilin skal halda fram í verandi líki.

Eisini skal bólkurin kanna, um eina skipan, har sernámsfrø›isliga rá›gevingin og skúli skulu vera hvør sær, skal setast í verk aftur. Í 1998 vóru júst Skúlin á Trø›ni og Sernámsfrø›isliga Rá›gevingin løgd saman til Sernámsdepilin, sum hevur sta›i› so nógv fyri skotum seinastu tí›ina.

Arbei›sbólkurin hevur somulei›is fingi› til uppgávu at gera tilmæli um eina skipan vi› serundirvísingardeplum í fólkaskúlunum kring landi›.

L‡sa Sernámsdepilin

Í arbei›ssetninginum ver›ur arbei›sbólkurin bi›in um at kanna og l‡sa, hvat brúkarar halda um sernámsfrø›isligu tilbo›ini í skúlaverkinum, og hvørji ynski tey hava til broytingar.

Kanningar skulu gerast vi› samrø›um, spurnarblø›um og á annan hátt. Bólkurin skal tosa vi› næmingar vi› serligum tørvi, foreldur, skúlar, sernámsfrø›isligu rá›gevingarskipanina, kommunur og áhugabólkar.

Arbei›sbólkurin skal l‡sa verandi serundirvísingarskipan og l‡sa vi›urskiftini á Sernámsdeplinum.

Eisini skal bólkurin samanbera skipaninar í hinum nor›urlondum vi› tí føroysku.

Í bólkinum, sum fer at gera kanningina, eru Hans Trygvi Teirin, Tóra Tóroddsdóttir og Steintór Rasmussen.

Bólkurin skal vera li›ugur vi› sítt arbei›i í seinasta lagi 1. oktober næsta ár, og tá skal tilmæli handast landsst‡rismanninum.

Fjarhitabrúkarar sóknast eftir svari

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í Hoyvík spyr nú Tórshavnar b‡rá›, um ta› er komi› til nakra ni›urstø›u í fjarhitamálinum

FJARHITASTRÍ‹
Ey›un Klakstein

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í Hoyvík spyr nú b‡rá›i› í Havn, um ta› er komi› til nakra ni›urstø›u í fjarhitamálinum.
Mynd: Jens Kristian Vang

Nú rykkir fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í Hoyvík eftir svari frá Tórshavnar b‡rá›i um fjarhitamáli›.

Fyrri einum gó›um mána›i sí›ani høvdu umbo› fyri eigarafeløgini fund vi› borgarstjóran í Havn, tí tey eru ónøgd vi› prísin á fjarhita, og nú vilja eigarafeløgini hava at vita, um b‡rá›i› er komi› til nakra ni›urstø›u í málinum.

Á fundinum, sum var› hildin 10. oktober, kravdu eigarafeløgini, at b‡rá›i› tekur ney›ug stig til loysn av prísspurninginum, so-lei›is at prísurin antin ver›ur lække›ur ella at fullgó›ar grundgevingar ver›a givnar fyri prísleguni.

Í ø›rum lagi kravdu eigarafeløgini, at ein óheft kanning ver›ur sett í verk av øllum prísvi›urskiftunum.

Eingi lyfti

Borgarstjórin í Havn seg›i seg einki kunna lova fjarhitabrúkarunum, uttan at hann vildi taka máli› upp á einum fundi, sum seinni tann dagin skuldi ver›a vi› lei›sluna og nevndina í Fjarhitafelagnum.

– Nú gó›ur mána›i er li›in sí›ani fundin, skulu vit spyrja, um b‡rá›i› er komi› til nakra ni›urstø›u í málinum. Um hetta ikki er so, nær ætlar b‡rá›i› at svara okkum, spyr fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum í skrivi til b‡rá›i›.

Sí›ani fundin hevur Fjarhitafelagi› sent brúkarunum skriv um prísppolitikkin, og hetta skriv hevur eisini veri› prenta› her í Sosialinum. Hetta skriv meta fjarhitabrúkararnir ikki vera naka› svar upp á teirra misnøgd.

– Eftir okkara ásko›an gevur kunningarskrivi› ikki á nakran hátt nøktandi frágrei›ing um prísvi›urskiftini. Tvørturímóti váttar Fjarhitafelagi› vi› hesum skrivinum alment teir skeivleikar, sum vit hava víst á vi›víkjandi prísásetingini, sigur fjarhitanevndin.

Drúgt strí›

Eigarafeløgini í Hoyvík hava sett eina fjarhitanevnd at taka sær av málinum um fjarhita.

Brúkararnir halda, at teir gjalda ov nógv fyri fjarhitan og vilja tí hava prísin settan ni›ur ella at fáa haldgó›ar grundgevingar fyri prísásetingini.

Lei›slan í Fjarhitafelagnum heldur at prísurin er í lagi og vil ikki ver›a vi› til eina óhefta kanning av prísunum.

Fjarhitanevndin hjá eigarafeløgunum hevur í trimum uppritum víst á, at øll gjøldini hjá Fjarhitafelagnum eru sett ov høgt sammett vi› ta›, sum tey sum hava oljuf‡r skulu gjalda fyri orkuna.

Fullveldi ver›ur høvu›smál

N‡ggi sjálvst‡risleisturin hjá samgonguni ver›ur ovasta máli› á dagsskránni fyri landsfundin hjá Fólkaflokkinum leygardagin

LANDSFUNDUR
John Johannessen


Óli Breckmann ætlar, at sjálvst‡risleisturin skal vi›gerast so gjølla á landsfundinum leygardagin, at eingin longur ivast í, hvat fullveldismáli› sn‡r seg um

Eftir landsfundin leygardagin skal eingin av limunum í Fólkaflokkinum ivast um n‡ggja sjálvst‡risleistin hjá samgonguni.

– Vit mugu vi›gera hetta máli› so gjølla, at ta› hereftir fer at klára seg sjálvt, sigur Óli Brecikmann, forma›ur í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum.

Óli Breckmann roknar vi›, at fólk á landsfundinum fara at taka undir vi› n‡ggju ætlanini, sum Fólkaflokkurin er partur av. Hann sigur seg rokna vi›, at fólk hava skilt, at ta› var ney›ugt at broyta mannagongdina í fullveldismálinum, um komast skal á mál.

Nógv onnur mál

Men hóat n‡ggi leisturin í sjálvst‡ristilgongdini ver›ur ovasta máli› á skránni, roknar Óli Breckmann ikki vi›, at hetta fer at ver›a máli›, i› fær drúgvastu vi›gerina á landsfundinum.

– Vit hava nógv onnur t‡dningarmikil mál, sum vit skulu vi›gera. Millum hesi eru fiskivinnan, fíggjarpolitikkurin, skattapolitikkurin, pensjónstryggingin, partabrævamarkna›ur og vinnumál og privatiseringar, vísir Óli Breckmann á.

Landsfundurin hjá Fólkaflokkinum í ár ver›ur opin fyri fjølmi›lunum. Fundurin ver›ur settur í Pállsstovu í Havn leygardagin klokkan 10.

50.000 krónur fyri at ættlei›a

Stendur ta› til Javna›arflokkin ver›ur stu›ulin til barnleys, sum vilja ættlei›a, hække›ur úr 15.000 upp í 50.000 krónur.

FYRISPURNINGUR
Magnus Dam



Lógin um ættlei›ingarstu›ul veitir ikki teimum barnleysu nóg gó›an stu›ul, um tey vilja ættlei›a børn. Ta› heldur Kristian Magnussen úr Javna›arflokkinum, sum sk‡tur upp at broyta lógina.

Í dag kunnu pør, sum vilja ættlei›a, søkja um at fáa 15.000 krónur í stu›uli, men hesin stu›ulin stendur als ikki mát vi› ta› sannroynd, at ta› er ókeypis hjá barnleysum at fáa royndarglasvi›ger›. Uppskoti› hjá Kristian Magnussen mi›ar ímóti at minka um fíggjarligu for›ingarnar hjá barnleysum at ættlei›a, solei›is at hesi hava eitt meira rættvíst val millum ættlei›ing og eftirgjørdan gitna›.

Kristian Magnussen sk‡tur upp, at ættlei›ingarstu›ulin hækkar upp í 50.000 krónur. Sambært tingmanninum kostar ta› millum 60.000 og 100.000 krónur at ættlei›a eitt barn. Til samanberingar vísir hann á, at ta› kostar umlei› 80.000 krónur at fáa vi›ger› fyri barnloysi.

– At javna hendan munin fer at betra um møguleikarnar hjá barnleysum at meta ættlei›ing sum eitt náttúrligt val. Í dag er ofta trupult hjá teimum, sum vilja ættlei›a, at fáa pengin til vega.

Kristian Magnussen heldur, at samfelagi› eigur at n‡ta meira orku uppá at vísa barnleysum á møguleikan vi› ættlei›ing, heldur enn bara at vísa á teknologi-fiksera›a vi›ger›, sum ikki altí› gevur úrslit.

– Fleiri dømi eru um kvinnur, sum hava fingi› álvarligar likams- og sálartrupulleikar av úrslitaleysari vi›ger›, sigur Kristian Magnussen.

– Í ár eru settar 105.000 krónur av á fíggjarlógini til ættlei›ingarstu›ul. Men í fjør komu bert tríggjar umsóknir og fyrraári› fýra. Kristian Magnussen heldur, at ta› kann hugsast, at fleiri fara at umhuga at ættlei›a, um stu›ulin ver›ur hække›ur, og somulei›is kann hugsast, at útrei›slan hjá sjúkrahúsverkinum til vi›ger› fyri barnloysi ver›ur minni.

Bókadagur í Havn

Sunnudagin skipar Føroya Rithøvundafelag fyri bókadagshaldi í útvarpshøllini. Rithøvundar leggja fram n‡ggj verk og H.N. Jacobsens Bókhandil selur bøkur.

TÍ‹INDASKRIV

Eins og gjørt hevur veri› seinastu árini, kunnar Rithøvundafelagi› um n‡ggjar bøkur. Sunnudagin 19. november klokkan 16.00 ver›ur slíkt bókadagshald í útvarpshøllini. Hesar løtur plaga at vera væl vitja›ar, tí her er høvi at koma á tal vi› høvundarnar.

Hetta er fyrsti almenni fundur í útvarpshøllini, sí›ani hon hon var løgtingssalur.Á bókadegnum fara fleiri rithøvundar at leggja fram n‡ggj verk og lesa úr teimum, Finnur Hansen fer at spæla klaver og H.N. Jacobsens Bókhandil skipar fyri bókaframs‡ning og sølu.

Bókadagshaldi› varar ein gó›an tíma og tey, sum fara at leggja fram, eru:

Anfinnur í Skála: Heimurin forni,
Bár›ur Jákupsson: Føroysk myndlist,
Oddfrí›ur Rasmussen: Rás/Sár,
Jógvan Arge: Teir tóku land 5,
Steinbjørn B. Jacobsen: Sjónleikurin Nólsoyar Páll,
Hans Tórgar›: "Macbeth" í t‡›ing Axel Tórgar›s,
Maud Heinesen. Í vøggustovu vi› Helenu,
Erling Poulsen: Meiri millum himmal og jør›,
J.P. Gregoriussen: Tórshavn vár mi›sta› og borg,

Rithøvundarnir fáa einar fimm minuttir í part at grei›a frá og lesa úr sínum verkum. H.N. Jacobsens Bókhandil hevur frams‡ning og og høvu ver›aur eisini at keypa bøkur á bókadagshaldinum.

HUGNAKVØLD
– serliga ætlað eldri fólki
verður á Hotel Föroyum
Mikukvøldið 6. des. kl. 19.00
Á skránni
3-rættars matskrá:
Fersk súpan v/ heimabakaðum breyði
Lambasteik v/ grønmeti, eplum og sós
Kaffi/te og mandlurís v/ mandlu í
Felagssangur -
har Fimmboði Lisberg
samskipar borðhaldið
KABARETT
við Grímu
FIMMBOÐI LISBERG
& VINMENN
spæla til dans
Sosialurin - 311820
Tilmelding á tel. 31 75 00 • Kostnaður kr. 225,-
Øll eru vælkomin,
bæði bólkar og einstaklingar
Altíð vælkomin á
Hotel Föroyar
Tel. 317500
Best Western